Kassamiðstøðin flytir til Toftir

Kassamiðstøðin, ið veitir øllum skipum og virkjum í landinum fiskakassar, flytir í næstum høvuðsvirksemi sítt til Toftir. Hetta skal betra tænastuna munandi

JOHN JOHANNESSEN

Kassamiðstøðin er einasti veitarin í landinum av øllum sløgum av køssum til feskan fisk til alla fiskivinnuna. Miðstøðin hevur goymslubygningar í Hvalvík, í Runavík, í Klaksvík, á Sandi og á Tvøroyri. Hetta tryggjar øllum fiskiskipum og fiskavirkjum kassar í einari skjótari vending, tá teimum nýtist teir.

Høvðusuppgávan hjá Kassamiðstøðini er alla tíðina at eiga kassar á goymslu, so teir kunnu fáast til vega, tá brúk er fyri teimum. Skipanin kann samanlíknast við pantiskipanir við fløskum hjá bryggjaríðum.


Kassamiðstøðin tekur sær eisini av at halda kassarnar við líka og gera neyðugu ábøturnar á teir kassar, ið fáa skaða undir landing og líknandi.

Betra um tænastuna

Í løtuni er Kassamiðstøðin í ferð við at byggja nýggjan bygning við síðuna av uppboðssøluni á Toftum. Byggingin er komin væl áleiðis, og gongst sum ætlað, stendur bygingurin klárur at taka í nýtslu í mars mánaði næsta ár.

Kári í Garði, stjóri á Kassamiðstøðini, sigur, at tað fer at betra munandi um tænastuna hjá miðstøðini, tá hon flytir í nýggja bygningin á Toftum. Tá kemur Kassamiðstøðin at liggja væl fyri, beint við síðuna av uppboðssøluni, og lættari verður tá hjá skipum at koma at henni.

Tá Kassamiðstøðin í mars flytir til Toftir, verða goymslurnar í Hvalvík og Runavík niðurlagdar, og virksemið verður miðsavnað í nýggja bygninginum.



Bygningurin hjá Kassamiðstøðini á Toftum er við at verða liðugur

Mynd: Jonhard Hammer

Ogn hjá fiskivinnuni

Brúk er altíð fyri køssum tá fiskiskapur er, og tí hevur Kassamiðstøðin nógv at gera. Men talan er ikki um eitt felag, ið fáir privatpersónar eiga, og tískil er tað eingin, ið gerst ríkur av Kassamiðstøðini.

Tað eru Føroya Ráðfiskaseljarafelag og Føroya Ráðfiskakeyparafelag, ið eiga Kassamiðstøðina. Føroya Ráðfiskaseljarafelag, er felagið hjá fiskiskipunum, meðan Føroya Ráðfiskakeyparafelag er felagið hjá fiskavirkjunum. Sostætt er tað fiskivinnan sjálv, ið eigur Kassamiðstøðina.

Krúnborg nógvar byrjanartrupulleikar

Óvanliga nógvir byrjanartrupulleikar hava forða Krúnborg í at fara til fiskiskap



Krúnborg, tá hon á fyrsta sinni stevndi inn um Glyvursnes

Mynd: Anfinn Frederiksen

JOHN JOHANNESSEN

Fyri tveimum vikum síðani kom nýggjasta og største føroyska fiskiskipið fyri fyrstu ferð til landið. Ætlanin var, at Krúnborg skuldi fara til fiskiskap nærum beinan vegin, men óvanliga nógvir byrjanartrupulleikar hava gjørt, at skipið enn ikki var sloppið til fiskiskap í gjár.

Ejler Jacobsen, reiðari, sigur, at tað er vanligt, at smávegis byrjanartrupulleikar eru at dragast við á nýggjum skipum. Men við nýggju Krúnborg hava trupulleikarnir verið fleiri enn vanligt.

Tá Krúnborg skuldi fara til fiskiskap varð funnið út av, at veiðrarnir máttu strammast betri á spølini. Hetta varð gjørt, men so fór eitt hydraulikrør. Tá hetta var umvælt fór umstýringin á høvuðsmaskinuni. Hetta brek var enn ikki rættað, tá vit tosaðu við Ejler Jacobsen í gjár. Tá var ein maður frá smiðjuni, ið hevur bygt motorin, á veg til Føroya við deilinum, ið skuldi til fyri at rætta brekið.

– Tað skuldi ikki verið so torført at rætta brekið, tá deilurin er komin, og tí vóni eg, at skipið fer til fiskiskap einaferð eftir midnátt, segði Ejler Jacobsen á middegi í gjár.

Nógvu byrjanartrupulleikarnir hava ikki gjørt, at Ejler Jacobsen hevur mist vónina. Hann vísir á, at prísurin á svartkjafti spakuliga er á veg upp eftir, og vísir hann á, at um drivið verður á at fiska, skal tað nokk fara at bera væl til at reka nýggju Krúnborg.

Kaffifundurin útsettur

Fundurin um fullveldismálið millum landsstýrið og Javnaðarflokkin er útsettur til í komandi viku

JOHN JOHANNESSEN

Fríggjadagin í fyrru viku var Javnaðarflokkurin á óformellum kaffifundi í Tinganesi. Talan var um ein fund, har landsstýrið kunnaði um arbeiðið við fullveldisætlanini, og var fundurin ein partur av tí, sum løgmaður kallar »tann politiska prosessin« í arbeiðinum at gera klárt eitt samráðingarupplegg til samráðingarnar við donsku stjórnina um broytingar í ríkisrættarligu støðu Føroya.

Á fundinum varð gjørt av, at partarnir skuldu møtast aftur seint í hesi vikuni. Men tá Sosialurin tosaði við landsstýrið og Jóannes Eidesgaard í gjár var enn eingin fundur avtalaður.

Landsstýrismaðurin í sjálvstýrismálum, Høgni Hoydal, hevur í vikuni verið burturstaddur, og er ein lítil misskiljing í hesum sambandi helst orsøkin til, at eingin fundur enn hevur verið. Høgni Hoydal helt nevniliga, at løgmaður skuldi boða til fundar, meðan løgmaður helt, at tað var Høgni Hoydal, ið skuldi geva fundarboð.

Væntast kann, at fundurin millum landsstýrið og Javnaðarflokkin verður hildin mánadagin ella týsdagin. Seinni skal landsstýrið eisini halda fundir við Miðflokkin og Sambandsflokkin.

